## Áttu besta libero

Føroyska kvinnulandsliðið í flogbólti fekk ein seinasta heiður EM-undankappingini, tá galla-kvøld stóð á skránni sunnukvøldið. Her var eitt sonevnt All-star lið tikið út, og føroyska liðið átti eitt umboð á hesum. Margit G. Joensen úr Mjølnir varð nevnliga kosin sum besti libero í kappingini, og fekk hon serstakt steyp fyri hetta.



## Nýggj svimjinevnd í Havn

Havnar Svimjifelag hevði um vikuskiftið aðalfund. Nevndin skipaði seg eftir fundin við Sigurd L. Lamhauge sum formanni. Svend Åge Seloy er næstformaður, Sámal Olsen er kassameistari, Marjun Eystberg er skrivari, og nevndarlimir eru Bjartur Mortensen og Susanne Eliasen.

# Kundi ikki kravt meira



*Niclas Joensen sæst her saman við teimum báðum royndastu spælarunum á føroyska liðnum. Margit Joensen og Helen á Lakjuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hóast vónbrotið var stórt, tá føroysku flogbóltskvinnurnar taptu móti Liktenstein leygardagin, so staðfesti venjarin eftir kappingina, at hann kundi ikki kravt meira frá spælarunum**

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt mest sum fullfiggjað ættarliðsskifti, har bara Margit G. Joensen og Helen á Lakjuni kunnu roknast millum veteranarnar, hevur sjálvandi sín prís.

Hesin kom partvíst til sjóndar, tá føroysku kvinnurnar leygardagin kundu spælt seg víðari í EM-undankappingini, um tær vunnu dystin móti Liktenstein. Í stórum pørtum av dystinum vóru okkara tá omaná, men mistøk vórðu framd júst í teimum løtum, har liðið ikki hevði ráð til hesi, og tað kostaði dýrt í 3-0 tapinum.

Men hóast hetta, so var tað ein framúr væl nøgdur landsliðsvenjari, sum eftir seinasta dystin kundi taka saman um kappingina.

- Fyrst og fremst, so kanst tú ikki samanbera oyggjaleikirnar við kappingina, sum vit nú hava havt. Tað er púrasta hvør sítt, og ikki ein dystur á oyggjaleikunum er á tí støði, sum vit hava sæð hesa kappingina.

- Liðið, sum vit hava nú, haldi eg vera eitt tað sterkasta, sum vit nakrantíð hava havt, og fyri framtíðina sær tað øgiliga gott út. Men sjálvandi er talan um eitt rættiliga ungt lið. Fleiri av spælarunum vóru stuðulsspælarar á U19-landsliðnum í fjør, men alt í alt trúgvi eg ikki, at vit á nakran hátt kundu stilla við einum liði, ið hevði megnað tað, sum genturnar hava gjørt hetta vikuskiftið.

Men tekur tú spælarar sum Margit og Helen frá, so hevur tú ein miðalaldur, sum er beint niðanfyri 22 ár?

- Ja. Og sjálvandi spælir rutinan eitt sindur inn í avgerandi dystunum. Men eg haldi framvegis, at liðið hevur staðið seg ótrúliga væl, og sum venjari kundi eg ikki ynskt meira enn tað, sum spælararnir góvu.

- Hinvegin gjørdist tað at enda avgerandi, at spælararnir ov sjáldan hava spælt dystir av hesum slagnum. Tann stóri munurin er, at øll mistøk verða revsað í slíkum dystum. Vit síggja í dag móti Luksemburg, har tær at kalla spæla sum ein maskina, og tí eru okkara alla somlu tíðina undir trýsti.

- Tí er tað avgerandi, at vit støðugt kunnu bjóða spælarunum slíkar avbjóðingar, tí tað er jú bert ein máti at økja um royndirnar. Og tað er við at spæla fleiri dystir, sigur Niclas Joensen.

**Føroyski hópurin**

| Spælari | aldur |
|---|---|
| Margit Joensen | 34 |
| Helen á Lakjuni | 30 |
| Annika á Stongum | 29 |
| Anna M. Kruse | 27 |
| Sólgerð Henriksen | 26 |
| Birita Joensen | 22 |
| Karin Mikkelsen | 22 |
| Helga Guttesen | 19 |
| Kate Kalsø | 19 |
| Ruth Thomassen | 19 |
| Sólvá Dimon | 19 |
| Birgit Guttesen | 17 |
| Miðalaldur | 23,58 |




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 7. umfarinum av Formula-deildini*

## Sundalagið úr botninum

**Teir næstbestu hjá EB/Streymi vunnu í gjárkvøldið 2-1 á teimum næstbestu hjá Víkingi**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur er ikki longur niðast í næstbestu deildini.

Í gjárkvøldið vitjaði næstbesta liðið hjá EB/Streymi Víking í Leirvík, og tað eydnaðist gestunum at fara til hús við 2-1 sigri, sum ber við sær, at EB/Streymur tvífaldaði um sítt stigatal.

Gestirnir skoraðu tvær ferðir í 1. hálvleiki, og í báðum førum var tað framrættaði miðvallarin Halldórur Joensen, sum var málskjútti. Í fyrra førinum eftir verjukiks, og í seinna førinum eftir stikkbólt frá Marcel.

Í 2. hálvleiki trýsti heimaliðið fyri at svara aftur, men tað eydnaðist teimum bara at skjóta eitt mál, sum unglingaspælarin Finnur Justinussen setti í netið eftir verjudrál inni í málteiginum.

**Víkingur-EB/Streymur 1-2 (0-2)**

0-1: Halldórur Joensen 16.
0-2: Halldórur Joensen 19.
1-2: Finnur Justinussen 57.